# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Eitt rættarmál, ið kann geva deyðadóm, verður avgreitt eftir tveimum minuttum*

*(ST-frágreiðing um Irak)*

# Eingin rættartrygd í Irak



*Amerikanskir hermenn taka ein sivilan iraka á náttartíð í Bagdad*

**- og irakska stjórnin virðir als ikki altjóða reglurnar um mannarættindini**

Iraksku myndugleikarnir leggja einki í reglurnar um mannarættindi, sum tískil verða brotnar í heilum. Tað stendur at lesa í einari frágreiðing, sum ST-stuðulsnevndin í Irak hevur skrivað, og sum í høvuðsheitum viðger tað, sum hendi í Bagdad tríggjar teir fyrstu mánaðarnar í ár.

Nevndin skrivar millum annað, at í hesum tíðarskeiði vórðu umleið 3.000 fólk tikin í Bagdad. Tey flestu vórðu tikin um náttina, tá amerikanskir og irakskir hermenn ganga á varðhaldi í býnum. Men tey tiknu hava onga trygd fyri, at tey verða viðfarin sambært teimum reglum, sum galda, skrivar nevndin.

Eitt nú verður víst á, at í fleiri førum eru fólk komin fyri rættin, og at tey nakrar fáar minuttir seinni hava fingið dóm, sjálvt um talan í summum førum hevur verið um deyðadóm og lívlanga fongsulsrevsing.

ST-nevndin sigur, at umleið 37.000 irakar sita í teimum iraksku fongslunum, sum amerikanararnir hava eftirlit við, men nógvir av fangunum vita ikki, hví teir eru har, og teir hava ongantíð verið í rættinum. ST-nevndin sigur at enda, at á rættartrygdarøkinum er støðan í Irak versnað nógv higartil í ár.

# Nú stendur á jøvnum

**Demokratiski senatorurin Barrack Obama hevur tikið Hillary Clinton aftur**

Tey bæði stríðast um at sleppa at stilla upp fyri demokratiska flokkin á forsetavalinum næsta ár. Hillary Clinton hevur ligið á odda leingi í stríðnum, men í seinastuni hevur Barrack Obama tikið seg nógv fram.

So nógv, at sambært teirri seinastu meiningakanningini stendur tað á jøvnum millum tey bæði. Kanningin sigur, at var val í dag, høvdu tey fingið 32 prosent av atkvøðunum í part. Fyri bara einum mánað síðani var Hillary Clinton 12 prosentstig framman fyri Barrack Obama. Á triðja plássi í seinastu kanningini er senatorurin John Edwards, sum fær 17 prosent.

Politiskir eygleiðarar í USA siga, at kanningin vísir, at Hillary Clinton sleppur at stríðast líka til sjálvt uppstillingarvalið hjá demokratunum. Men kanska hevði hon væntað tað. Í hvussu er hevur hon savnað 26 mió. dollarar til valstríðið. Men Obama er ikki fyri ongum, tí á hansara valkontu standa 25,8 mió. dollarar.






*Tað er púra javnt ímillum Hillary Clinton og Barrack Obama*

## STUTT SAGT

### Heitt summar

Danskir veðurmenn halda seg longu nú duga at síggja, at summarið verður gott ella í hvussu er lýtt í ár. Fyribils umfatar kanningin mánaðarnar mai, juni og juli, og metingin er, at teir verða lýggjari í ár enn vanligt. Helst verður hitin millum 1,0 og 1,3 stig oman fyri tað vanliga. Tað ljóðar kanska ikki av so nógvum, men veðurmenninir siga, at sjálvt ein so avmarkaður munur ger, at danir kunnu vænta sær væl fleiri dagar við 25 hitastigum enn onnur ár. Hinvegin er hitin ofta óstøðugur sum eitt nú í fjør. Tá var juli tann heitasti í mong ár, men kortini var summarið bara tað fjórðheitasta, fólk vita um. Seinasta metsummarið var í 1997, tá hitin fleiri ferðir fór upp um 30 stig.

### Dylja røttu tølini

ST-stuðulsnevndin í Irak vil vera vera, at stjórnin í Bagdad vil ikki siga sannleikan um, hvussu nógv sivilfólk lata lív í ófriðinum í landinum. Stuðulsnevndin sigur í einari nýggjari frágreiðing, at stjórnin er givin at upplýsa, hvussu mong sivilfólk lata lív, og at stjórnin ístaðin fyri leggur onnur undir at upplýsa skeiv tøl. ST-nevndin sigur seg vera komna til ta niðurstøðu, at ófriðurin í Irak kostaði minst 34.452 sivilum irakum lívið í fjør, og tað er næstan tríggjar ferðir meiri, enn irakska stjórnin hevur sagt. Men ST-nevndin heldur uppá, at hennara tal er á góðari leið.